# FM undankapping í Talvi fyri ung

**Fyrra FM undankappingin í talvi fyri ung var í Miðvági leygardagin**

TALV
*tíðindaskriv*



*Í bólki E vann Høgni E. Nielsen frammanfyri Janus E. Nielsen og Jógvan E. Joensen*

Luttøkan var hampuliga góð; 48 børn og ung luttóku. FM kappingin er skipað tveimum undankappingum, har 8 tey bestu í hvørjum aldursbólki vinna sær rætt til finaluna. Í finaluni er ikki bert FM heitið uppá spæl. Føroyameistarin og nr. 2 í hvørjum bólki luttaka í Norðurlandameistaraheitinum sum verður í Noregi í februar mánað 2005.

**Úrslitið í kappingin í Miðvági gjørdist:**
**Bólkur E:** Telvarar 10 ár og yngri:

| | Stig |
|---|---|
| 1 Høgni E. Nielsen, Sandavágs talvfelag | 8 |
| 2 Janus E. Nielsen, Sandavágs talvfelag | 6 |
| 3 Jógvan Emil Joensen, Vestmanna talvfelag | 6 |
| 4 Jóhann Vørmadal | 5 |
| 5 Bárðu J Stórá | 5 |
| 6 Hørður Johansen | 5 |
| 7 Sølvi Egilsson | 5 |
| 8 Rúni Jacobsen | 4 |

Samanlagt luttóku 12 telvarar í hesum bólkinum. Tann bert 7 ára gamli Høgni E. Nielsen úr Sandavági vann kappingina við fullum stigatali. Rættiliga spennandi ungur telvari sum eisini gjørdi um seg í kappingini fyri ári síðani.

**Bólkur D: 11-12 ár:**

| | |
|---|---|
| 1 Hjalti T. Jógvansson, Havnar Telvingarfelag | 5 |
| 2 Rógvi E. Nielsen, Sandavágs talvfelag | 4,5 |
| 3 Rúni Vørmadal, Vestmanna talvfelag | 3,5 |
| 4 Heiðrikkur Jacobsen | 3 |
| 5 Olaf R. Samuelsen | 3 |
| 6 Poli Bernhardsson | 2 |
| 7 Janus Gudmundsen | 0 |

Burtursæð frá at tapa talvið ímóti Rúna, vann Hjalti øll talvini í kappingini. Rógvi, sum gjørdist føroyameistari í bólkinum í fjør, endaði á øðrum plássi, bert hálvt stig eftir Hjalta. Hesir báðir luttóku í NM kappingini í Svøríki seinast. Olaf og Rúni luttóku somuleiðis í NM seinast og eru ryktir upp frá yngra bólkinum. Telvararnir eru sera javntsterkir og dagsformurin verður avgerandi fyri hvør fer við sigrinum tá avtornar.

**Bólkur C: 13-14 ár:**

| | |
|---|---|
| 1 Helgi Dam Ziska, Havnar Telvingarfelag | 8 |
| 2 Margar Berg, Havnar Telvingarfelag | 6,5 |
| 3 Rógvi Dragaberg, Klaksvíkar talvfelag | 6 |
| 4 Jaspur Enghamar | 5 |
| 5 Herborg Hansen | 5 |
| 6 Bogi Hansen | 5 |
| 7 Gudmund Niclasen | 5 |
| 8 Jón Olsen | 5 |

Heili 25 telvarar meldaðu luttøku í hesum bólkinum, og ikki óvæntað vann Helgi kappingina við fullum stigatali. Helgi hevur í seinastuni gjørt eitt rættiligt skarvslop í styrki. Umframt at vera unglingaføroyameistari vann hann eisini í vár FM í snar og nú liðkappingin er byrjað telvar hann í fyrstu deild. Margar megnaði hesaferð at leggja verandi Føroyameistaran Rógva Dragaberg afturum seg, men kappingin verður óivað sera hørð og jøvn um annað NM plássið — bert hálvt stig er á muni ímillum nr. 2 og 8. Seinasta NM luttóku Rógvi og Helgi.

**Bólkur B: 15-16 ár:**

| | |
|---|---|
| 1 Rógvi Mortensen, Havnar Telvingarfelag | 5 |
| 2 Jón Gregersen, Sandavágs Talvfelag | 5 |
| 3 Ingi W. Joensen, Miðvágs Talvfelag | 2 |
| 4 Andrass Mikkelsen | 0 |

Umdystur skuldi til ímillum Rógva og Jón til tess at finna vinnaran í bólkinum. Báðir luttóku í NM seinast og ábendingar eru um, at hesir báðir eru ávegis at endurtaka bragdið – tó var luttøkan minni enn væntað og aðrir telvarar kunnu gera seg galdandi í seinnu úttøkukappingini og í finaluni.

**Bólkur A: Aldursbólkur 17-19 ár:**
Undankappingar verða ikki telvdar í hesum bólkinum. Eins og í fjør verður bert finala telvað. Olaf Berg má metast sum favorittur at vinna bólkin, meðan kappingin um annað NM plássið helst fer at verða ímillum Rana Baldursson og Sjúrð Thorsteinsson.

Onnur úttøkukappingin verður á Oyrarbakka 20. november og finalan 27. november í Argja Skúla – sí annars á www.faroechess.com.

## Carlsberg sleppur ikki við

Normenn vilja ikki finna seg í, at FCK hevur lýsingar fyri ølmerkinum á bringuni

Sambært norskari lóg er nevnliga forboðið at lýsa við alkoholi, og tað gevur trupulleikar, nú farast skal undir norðurlendsku Royal League.

Nevndarformaðurin í norska fótbóltssambandinum, Olav Boksasp, hevur sagt, at antin má FCK finna sær nýggjan sponsor, ella skal einki vera á búnunum í nýggju kappingini. Hetta vilja tey í FCK tó ikki góðtaka.

– Royal League er ein altjóða kapping. Kunnu normenn ikki laga seg eftir altjóða reglum, so kunnu teir bara lata vera við at taka lut, sigur ítróttarstjórin í FCK, Niels Christian Holmstrøm.

-jm




Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

W W W . S O S I A L U R I N . F O



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skúlavørður til Argja skúla



**Argja skúli**

Í Argja skúla eru 366 næmingar. Har starvast 31 lærarar.

Skúlin varð tikin í nýtslu í 1977, men varð tó ikki liðugur og vígdur fyrr enn í 1979. Skúlin er bygdur í einari hædd. Byggingin er heilt serlig, tí eingin gongd er í skúlanum. Mitt í skúlanum er stór opin høll, har allar stovurnar ganga út frá.

Til ítrótt er fimleikahøll og svimjihylur. Uttanfyri er stórur skúlagarður, og niðanfyri skúlan er fótbóltsvøllur.

www.torshavn.fo

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skúlavørði til Argja skúla.

**Arbeiðið**
umfatar m.a.:
- at røkja bygningar og økið uttanum skúlan
- at hava umsjón við svimjihylinum
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini í skúlanum eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum
- at halda reint og ruddiligt inni og úti
- at hava umsjón við og samskipa reingerðina í skúlanum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast gjørligt. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marjuna Holm, skúlastjóra, tlf. 31 41 36 ella Eivind Danielsen, byggifrøðing, tlf. 30 20 10.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. november 2004. Viðmerkið umsóknina "Skúlavørður".

## Bilar til sølu

**Nissan Almera 1,5 bensin**



· Árg. 2002 · Km 26.000
· 5 hurðar, air-condition, el-rútar framman, el-spegl, hita í setrinum

prísur **125.000,-**

**SsangYong Musso 2,9 TD 4WD**



· Árg. 1999 · Km. 75.000
· Vørubilur, 5 hurðar, el-rútar, tónaðir rútar aftan, krók, lættmetal felgur, heilársdekk

prísur vi MVG **147.000,-**

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tel 31 10 13 · Fartel 51 10 13
Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2.0 Diesel** árg 1999, vínreyður, 4 hurðar, km. 106.000 **98.000** | **Opel Vectra 2.0 Dt** árg 1998, bláur, 4 hurðar, km. 133.000 **89.000** |
| **Peugeot 307 2.0 110 HK** árg 2002, gulur, 5 hurðar, km. 70.000 **169.000** | **Opel Vectra 1.8 16v** árg 1998, lj. bláur, 4 hurðar, km. 106.000 **97.000** |
| **Peugeot St. car 406 2.0 bensin** árg 2002, brúnligur, 5 hurðar, km. 39.000 **179.000** | **Opel Vectra 1.6 4x4 bensin** árg 1989, bláur, 4 hurðar, km. 127.000 **36.000** |
| **Peugeot 406 1.8 bensin** árg 1997, grønur, 4 hurðar, km. 130.000 **99.000** | **VW Golf 1.9 Diesel Vøruv.** árg 12/1996, hvítur, 5 hurðar, km. 140.000 **59.000** |
| **Peugeot 807 ST 2.2 Hdi Van** árg 2003, beige, 5 hurðar, km. 23.000 v/mvg **238.000** | **Mazda E2200 Lastbilur** árg 1996, reyður, 2 hurðar, km. 69.000 **69.000** |
| **Opel Combo 1.4 Van** árg 1999, hvítur, 3 hurðar, km. 49.000 v/mvg **55.000** | **VW Polo Diesel** árg 1998, bláur, 4 hurðar, km. 130.000 **88.000** |
| **Opel Corsa 1.2 16v** árg 2002, bláur, 3 hurðar, km. 62.000 **98.000** | **Ford Escort 1.8 Bensin** árg 1995, grønur, 4 hurðar, km. 104.000, **49.000** |
| **Opel Corsa 1.2 16v Sport** árg 1999, grønur, 3 hurðar, km. 75.000 **49.000** | **Toyota Carina II 1.6** árg 1989, reyður, 4 hurðar, km. 258.000, sýnaður *mai 2004* **35.000** |
| **Opel Astra 1.6 AC** árg 2001, grønur, 5 hurðar, km. 65.000 **109.000** | **Toyota Carina II 1.6** árg 1989, reyður, 4 hurðar, km. 226.000, sýnaður *juli 2004* **35.000** |
| **Opel Astra 2.0 DTI TD** árg 1999, bláur, 4 hurðar, km. 72.000 **109.000** | **Toyota Corolla 1.6** árg 1999, beige, 5 hurðar, km. 86.000 **89.000** |
| **Opel Astra 1.6 Club** árg 1998, bláur, 5 hurðar, km. 105.000 **87.000** | **Toyota Corolla 1.6 Van** árg 1998, reyður, 5 hurðar, km. 29.000 v/mvg **72.000** |
| **Opel Astra 1.6 bensin** árg 2000, svartur, 5 hurðar, km. 80.000 **89.000** | **Citroen C2 Bensin** árg 2003, svartur, 3 hurðar, km. 12.500 **149.000** |
| **Opel Astra 1.7 DT** árg 1999, grønur, 5 hurðar, km. 104.000, nýsýnaður **105.000** | **Kia Sephia 1.5 GTX bensin** árg 1997, reyður, 4 hurðar, km. 139.000 **65.000** |
| **Opel Vectra 2.0 DT, stc** árg 1997, svartur, 5 hurðar, km. 182.000 **89.000** | P/F Meinhardt Arge |

Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.bilarge.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 34 54 00

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## Móttøka

*Mikudagin 10. november 2004 hátíðarheldur Tekniski Skúlin í Tórshavn 70 ára stovningardagin. Í hesum sambandi verður almenn móttøka:*

**mikudagin 10. nov. kl. 15 - 17**

*á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin.*

Í sambandi við hátíðardagin, gevur skúlin út føðingardagsrit, sum verður lagt fram á móttøkuni.

## Sethús og handilshøli til sølu




Vegna Føroya Skitirætt verður ognin J.C. Svabosgøta 4, 100 Tórshavn, við hesum lýst til sølu.

Talan er um eini sethús við útbygningi
Sethúsið er bygt í 1932, tað er í tveimum hæddum, hvør á umleið 50 m2, innrættað soleiðis:

Kjallari: Kjallararúm, lítið wc, og rúm ið hevur brúkt til handil
Miðhædd: Gangur, baðirúm, køkur, stova og eitt kamar

Tilbygningur í einari hædd á uml. 70 m2, er bygdur í 1965.
Tilbýgningurin er í tveimum, eitt handilshøli og eitt minni rúm
Tilbygningurin er útleigaður, og leigusáttmálin stendur við til 30.10.2005
Skiftirætturin tilskilar sær rætt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av

*Nærri upplýsingar um ognina fáast frá:*

Advokatskrivstovuni
Fr. Petersensgøtu 9 · 110 Tórshavn · Tel. 311145
Att: Fríða Patursson, adv.
frp@jura.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2678,**
Sp/f K.J.H, 700 Klaksvík.

**Stjórn:**
**Farnir frá sum stjórar:**
Johannes Hansen, Við Grástein, 700 Klaksvík og Kjartan Hansen, e. Í Garðinum, 700 Klakvík.
**Innkomnir sum stjórar:**
Dennis Hansen, Kjalarskákið 7, 700 Klakvík og Kjartan Hansen, y. Undir Brúnni 42, 700 Klakvík.

Skráseting Føroya tann 4. november 2004

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2757,**
Sp/f Vevstovan Mýrifípan, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:**
04.10.2004.
**Nýtt hjánavn:** sp/f Mýrifípan
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka tekstilídnað, útleigan,keyp, søla og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 4. november 2004

Kristin Balle

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við